# Íslendsku Showmenn



*Jógvan Hansen og hansara fólk spældu síni lániløg sannførandi, men tað var í teimum heimagjørdu løgunum at veruligt lív kom í*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Jógvan Hansen og bólkur hansara vísti, at her var talan um sera góðar tónleikarar, og meira enn ein framúr góðan sangara. Samanberingin við Showmenn tyktiskt nærliggjan di.**

SUMMARFESTIVAL
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Meðan veðurgudarnir leygarkvøldið góvu Summar Festivalinum ein frammaná, so var timingin hjá teimum ófør fríggjakvøldið, eftir at 10.000 fólk í turrveðri høvdu upplivað eitt rokkbrak við The Scorpions, fór at sirma. Nógv fólk nýttu tí høvið at fara inn í turra FLAGS-tjaldið, har lokala hetjan Jógvan Hansen fór á pall. Jógvan Hansen hevði við sær bólkin, ið stuðlaði honum á veg til sigurin í íslendsku songkappingini X-Factor.

Teltið var rættiliga fult, og Jógvan og bólkurin tyktust væl uppløgd. Umframt gittarleikara, bassleikara, trummuleikara og tangentleikara vóru eisini tveir framúrskarandi kórsangarar við honum, teirra frálíku kór lyftu framførsluna upp á eitt sera høgt støði. Ein av teimum var songkvinnan Kristjana Stefánsdóttir, ið er viðurkendur sangari og sanglærari í Íslandi.

### Sum ein dansur

Á skránni vóru fyri tað mesta lániløg, her vóru løg hjá eitt nú George Michael, Robbie Williams og U2, serliga væl vóru rokkløgini væl móttikin. Umframt øll lániløgini vóru tvey gomul hitt hjá Jógvani á skránni, Aria lagið ”Rooftop” og Kularrøtur lagið ”Hon Er Omma Mín”, hetta vóru uttan samanbering nógv best umtóktu løgini á kvøldinum. Eftir at hava spælt Rooftop, sum í løtuni liggur ovast á íslendska popptindinum, segði Jógvan, at teir áttu bert at spælt hetta lagið. Hóast talan var um skemt, var ein sannleiki í hesum. Eg saknaði meira heimagjørt, og konsertin bar brá av at vera dansur, ein væl spældur dansur, men altso ein dansur.

Miðskeiðis í konsertini fór Jógvan av pallinum, og lat Kristjanu Stefánsdóttir sleppa til, í einum frálíkum soul lagið, vísti hon júst hví hon er so viðurkend í Íslandi. Eisini hin kórsangarin, ið var mannfólk, slapp at royna seg, tá Jógvan aftur fór av pallinum, og hann saman við bólkinum sang Living on a Prayer hjá Bon Jovi.

Tað er ikki nógv at seta fingurin á í framførsluni, alt var væl spælt, sungið og lagt til til rættis. Jógvan var flott stylaður og sá út sum ein poppstjørna.

# Gimsteinurin skein í regninum

**Amy Diamond fór á pall á Summarfestivalinum í oysandi regni og nakað av vindi var eisini, men heitu rútmurnar savnaðu fleiri túsund á Vágsbø**

SUMMARFESTIVAL
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Talan var um sól og summarrútmur, ið mest bjóða til stuttar buksur, sól, bambussmáttur og heitan dans, tá Amy Diamond fór á pall á Vágsbø. Men veðrið spældi ikki við. Tað oysregnaði og eitt lot var eisini. Alt meðan pallurin tyktist í syrgiligari standi, og baktjaldið smoygdi sær niðureftir, fór tónleikabarometrið uppeftir.

Lítli svenski poppdiamanturin hevði eina lívliga framførslu. Góða røddin hugtók tey mongu, ið hóast veðrið høvdu leitað sær á Vágsbø. Lítli kroppurin við stóru røddini hevði eina rimmar framførslu. Afturvið sær hevði hon dansarar, ið eisini høvdu´góða framførslu.

Hóast veðrið als ikki var við, og sóltónleikurin ikki hóskaði, so lat Amy ikki við seg koma, men hevði eina góða framførslu. Og harvið fingu áhoyrararnir eina góða uppliving í regninum. Ein professionell 15 ára gomul, ið fekk lurtarar at fara í andstøðu til regnið, og halda út í hendan tónleikatíman.

Eitt jaligt upplivilsi, bæði tónleikaliga og hugfarsliga, tí regnið og sterka lotið settu ikki kílar í framførslu og heildaruppliving. Ongin ivi skal tó vera um, at Amy hevði verið heilt framúr, um hon hevði tónleikarar afturat sær, og ikki noyddist at standa á palli í eini sing-back framførslu.



*Amy Diamond var síðsta navn, ið slapp á stóra pallin, áðrenn illveðrið steðgaði festivalinum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Riggaði hjá Peturi



*Petur Háberg hevur unga og sera dugnaliga manning við sær*
*Mynd: D. Olsen*

**Petur Háberg spældi í Flagstjaldinum á Summarfestivalinum**

SUMMARFESTIVAL
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Petur Háberg var á palli á Summarfestivalinum í flagstjaldinum, innan tað byrjaði at farast í nógva vindinum.

Undirritaði hevur ikki hoyrt Petur áður og gjørdist bilsin.

Her var talan um popp við tyngd í. Kanska meira rock. Og tað riggaði væl hjá Peturi, og unga manningin spældi sera væl. Tað er stuttligt at hoyra so unga manning spæla so væl.

Fleiri og fleiri leitaðu sær í tjaldið, meðan Petur stóð á palli og fjøldin fagnaði framførsluni, og eg haldi eisini, at tað var uppiborið.Petur og bólkur hansara borgarðu fyri eini góðari framførslu, har ljóðið eisini var í ordan. Popprockur á enskum frá listafólkum, ið ikki eru ensk, kann skjótt gerast ov útvatnað ella heilt einfalt ov vánaligt, men so er ikki hjá Peturi Háberg. Talan er um eina heild, ið situr sum hon skal.

Poppurin hjá Peturi var í roynd og veru rockur, ið ikki fer illa við oyrunum. Og tað hóskaði sera væl klokkan 16:30 á degi.